# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hákun Thorkildshøj, Tórshavn:

## Heiðurstekin fyri 41 ár sum pantifúti

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, handaði á samkomu fríggjadagin Hákuni Thorkildshøj heiðurstekin frá Drotningini fyri tænastu í 41 ár**



*Hákuni Thorkildshøj var á samkomu í Fíggjarmálráðnum fríggjadagin heiðraður fyri trúgva tænastu í 41 ár*

### HEIÐURSTEKIN

Tey munnu vera fá, ið røkja sama starv í meira enn 40 ár. Hesin høgi tænastualdur er tó veruleiki hjá Hákuni Thorkildshøj, sum í samfull 41 ár hevur havt starv sum pantifúti.

Fyri hesa longu og trúgvu tænastu fekk 67 ára gamli Hákun Thorkildshøj í Havn heiðurstekin frá Margretu Drotning, ta sonevndu "Fortjenstmedaljen".

Tað var Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ið handaði Hákuni Thorkildshøj heiðurstekinið. Handanin fór fram á eini samkomu í Fíggjarmálaráðnum fríggjadagin.

Hákun Thorkildshøj byrjaði í starvi sum pantifúti 1. august 1964, og hann røkti hetta starv, til hann 1. oktober 2005 fór frá fyri aldur. Hákun Thorkildshøj var eisini deildarleiðari á táverandi Skattadeildini, men starvinum sum pantifúti slepti hann ongantíð hesi mongu ár.

Heiðursmerkið verður veitt eftir 40 ára tænastu hjá tí almenna. Medaljan er persónlig ogn, og navnið á hinum heiðraða er grivið inn í rondina á heiðurstekininum.



*Hákuni Thorkildshøj saman við familjuni*

## Teldustøðingar lokið útbúgving



Fríggjadagin 27. januar var prógvhandan á Føroya Handilsskúla, har 11 teldustøðingar fingu handað prógv. Tey lesandi vóru:

Aftasta røð frá vinstru: Bogi Frederiksen, Robin Kjeld, Uni Johannesen, Rúni Poulsen, Eliesar Wiegand og Reidar Beck.

Fremsta røð frá vinstru: Chris Shields, Høgni Danielsen, Birgit Sólbjørg, Annika Krossteig og Bjarni Thomsen

## Andlát og jarðarferðir

**Teddy Michelsen, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 4. februar, 77 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13 úr Salem á Tvøroyri. Tey, ið vilja minnast Teddy, kunnu lata eina gávu til Salem Tvøroyri, konta í peningastovninum.

**Amalia Højsted, Langasandur**, ættað úr Dali, andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði leygardagin 4. februar, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður í kirkjuni í Haldarsvík mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Amaliu, kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið í Kollafirði, konta í Føroya Sparikassa.

**Jóhann Jákup Djurhuus, Selatrað**, andaðist í heiminum fríggjadagin 3. februar, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Selatrað mánadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jóhann Jákup, kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna á Selatrað, konta í peningastovninum.

Kunngjørt verður at elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Teddy Michelsen**
Tvøroyri

andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygarkvøldið 4. februar 2006, 77 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Salem á Tvøroyri hósdagin 9. februar kl. 13.00.

**Oda**
**Evi, Kristbjørg, Noomi og Diana**

*Tey, ið vilja minnast Teddy, kunnu lata eina gávu til Salem, konto í peningastovnunum.*

**Dagurin í morgin**

**7. februar. Rikard,** deyður umleið ár 720. Enskur kongur, sum gjørdi pílagrímsferð til Róm og Heilaga Landið, men doyði longu á útferðini. Summi halda, at talan er um Rikard Leyvuhjarta, sum doyði í 1199, men hann varð ongantíð skírdur halgimenni. Germanskt navn, ið merkir mikil, harður ella sterkur.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo